# ÚTLAND

SAMBAND
Árni Joensen
fartekst@mail.dk
tlf 341800

*– Zionistiski fíggindin fær freist til klokkan fimm í morginári at lata fangarnar leysar.*

*Palestinsku burturflytararnir*

**STUTT SAGT**

## Muhammed kann ikki flyta pengar

Eftir áheitan frá amerikonsku myndugleikunum hava bankar sum eitt nú Western Union steðgað pengaflytingum, um sendarin ella mótttakarin eitur Muhammed, Ahmed ella okkurt annað arabiskt navn, skrivar AP.

Sum dømi nevnir tíðindastovan, at í einum føri steðgaði Western Union einari flyting frá einum indiskum bilførara. Hann skuldi flyta einum vinmanni 750 krónur, men bankin steðgaði flytingini, tí vinmaðurin hevði eitt arabiskt navn.

– Eg fekk at vita frá bankanum, at um eg ætli mær at flyta Sahir Muhammed pengar, so verður flytingin ikki avgreidd orsakað av navni hansara, sigur indiski bilførarin við AP.

Amerikonsku myndugleikarnir hava givið pengastovnunum boð um at steðga øllum pengaflytingum, um illgruni er um, at pengarnir skulu brúkast til yvirgangsvirksemi. Tað rakar serstakliga tey, sum eita okkurt arabiskt navn.

## Valevni doyði

Herry Lewites, sum stillaði upp til forsetavalið í Nikaragua, doyði brádliga í gjár av hjartaslag. Hann var 67 ára gamal.

Eygleiðarar siga, at deyði hansara kann hava við sær, at fyrrverandi forsetin Daniel Ortega vinnur forsetavalið. Tað var Ortega, sum í áttatiárunum stóð á odda fyri bardaganum ímóti teimum sokallaðu contradeildunum, sum fingu stuðul úr USA.

Herty Lewites og Daniel Ortega hava verið floksfelagar í tí vinstrasinnaða sandinistaflokkinum, men Lewites fór burturúr og stillaði upp ímóti Ortega. Sambært teimum seinastu veljarakanningunum fer Ortega at vinna valið í harðari kapping við eitt konservativt valevni. Næstur teimum báðum var Herty Lewites, og spurningurin er nú, hvør fær hansara atkvøður.

## Sjáldsamar delfinir

Nakrir lívfrøðingar hjá amerikanska náttúruverndarfelagsskapinum Wildlife Conservation Society siga, at teir hava funnið eitt sjáldsamt slag av delfinum, sum halda til í einari stórari á í Burma.

Vísindafólkini siga, at tey hava sæð 60 delfinir í ánni. Hetta er tó ikki fyrstu ferð, at fólk hava sæð hesar delfinirnar, og fyri tveimum árum síðani vísti ein kanning, at tá vóru 72 delfinir í ánni. At tær eru færri nú kemst av, at burmesiskir fiskimenn veiða tær við gørnum ella við at geva teimum elektriskan stoyt, sjálvt um delfirninar eru friðaðar.

Hetta slagið av delfinum verður rópt Irrawassydelfinir, og tær hava navn eftir ánni, sum tær halda til í.

## Prestur álopin

Fyritriðjuferð síðani í mars er ein katólskur prestur álopin í Turkalandi. Tað hendi í býnum Samsun sunnudagin.

Løgreglan sigur, at ein maður leyp á prestin við knívi, men at tað eydnaðist prestinum at sleppa undan álopsmanninum, sum tó fekk stundir til at stinga prest í annað lærið. Turkiska løgreglan dugir ikki rættiliga at siga, hví teir katólsku prestarnir verða álopnir.

# Ísrael fingið freist frá burturflytarunum

**Sleppa teir palestinsku fangarnir ikki leysir innan klokkan fimm í morginári, er lívið hjá Gilad Shalit í vanda.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*



*Gilad Shalit*

Teir tríggir palestinsku bólkarnir, sum siga seg hava burturflutt ísraelska hermannin Gilad Shalit, hava nú givið ísraelsku myndugleikunum eini greið boð:

– Vit geva zionistiska fíggindа okkara eina freist. Allar palestinskar kvinnur og palestinskir ungdómar, sum sita í ísraelskum fongslum, skulu last leys innan klokkan fimm í morginári. Verður tað ikki gjørt, kunnu burturflytararnir ikki átaka sær ábyrgdina av lívinum hjá hermanninum stóð í einari kunngerð frá bólkunum í morgun.

Ísraelska stjórnin svaraði alt fyri eitt, at hon fer ikki at slaka fyri krøvum frá yvirgangsmonnum.

– Eg haldi, at støðan hjá stjórnini er ógvuliga greið, segði ráðharrin Isaac Herzog, sum situr í tí serliga trygdarráðnum hjá stjórnini.

Nakrar tímar frammanundan hevði ísraelski herurin sent fleiri stríðsvognar inn í tann norðara partin av Gaza-geiranu, samstundis sum tyrlur skutu rakettir eftir fleiri málum, sum sambært útvarpinum hjá herinum vóru tilhaldsstøð hjá víðgongdum palestinskum bólkum.

Egyptiskar keldur vildu í nátt vera við, at tann Gilad Shalit er á lívi. Sambært keldunum hava egyptiskir embætismenn hitt burturflytararnar og fingið vissu fyri, at hermaðurin er á lívi enn. Embætismenninir skulu hava sagt, at hann er særdur, men ikki í lívsvanda.

Tað er hann harafturímóti klokkan fimm í morginári, slaka ísraelsmenn ikki.

# 90 ár síðani Somme-álopið

**Tann 1. juli í 1916 settu teir sameindu eitt stórálop í verk ímóti týskarunum við Somme. Tað kom at kosta eina millión mannalív.**

KRÍGGJ
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Klokkan hálvgum átta um morgunin tann 1. juli í 1916 herjaðu bretskir og franskir hermenn á tær týsku støðirnar í Thiepval-skóginum nærhendis franska býnum Somme.Í hálvtannað ár høvdu partarnir ligið í skotgravunum og bíðað eftir hvør øðrum. Nú høvdu teir sameindu sett sær fyri at reka týrkararnar aftur eftir hæli, men álopið gjørdist eitt nyttuleyst blóðbað.

Undan sjálvum álopinum høvdu bretskar og franskar kanónir bumbað tær týsku støðirnar frá morgni til myrkurs, men uttan stórvegis avleiðingar. Týskararnir vistu, at teir sameindu fyrireikaðu seg til stórálop, og tá teir 200.000 bretsku og fronsku hermenninir lupu á um morgunin tann 1. juli, vóru týskararnir til reiðar at taka ímóti teimum. Nógvir hermenn fullu fyri teimum týsku maskinbyrsunum, og tá kvøldið kom, høvdu 19.000 bretskir hermenn latið lív, og 40.000 aðrir vóru særdir.

Bardagin við Somme varði í góðar fýra mánaðir, til teir sameindu gjørdu av at steðga á. Tá høvdu teir tikið seg 12 kilometrar fram, men prísurin var óhugnaligur. Meiri enn 400.000 bretskir, 200.000 franskir og 500.000 týskir hermenn høvdu latið lív í bardaganum.